


**Jacob Djurhuus:**

# Doyði í einsemi í Grønlandi 23 ára gamal

**Næstelsta barnið hjá Johan Christian Djurhuus, Faktorin í Klaksvík, var Jacob. Hann var føddur í 1860. Hann er ikki skrásettur í nakrari fólkateljing í Klaksvík aftaná tað. J. Símun Hansen kom í bókaroðini "Tey bygdu Land," til ta niðurstøðu, at hann er deyður sum lítil, men tað var hann ikki. Hann hevur havt eina óvanliga søgu, sum vit kunnu hava her**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Fyrsta "lívstekn" frá Jacob er, at fleiri føroyingar eru komnir fram á hansara grøv í lítlu nú avtoftaðu bygdini Rittenbenk norðuri í Grønlandi. Tí er staðfest, at hann er endaður her uppi, og gjørdist bert 23 ára gamal.

Í skrásetingunum hjá Viggo Christiansen verður sagt, at Jacob í 1870 er realskúlanæmingur í Havn og býr hjá Katrinu Margretha Elisabeth Olsen (1826-1908) í núverandi Magnus Heinasonargøtu 2. Katrina var einkja eftir pápabeiggjan Hans Olaus Djurhuus (1822-1866), ið var bóndi á vestara Húsagarði.

Jacob er ikki skrásettur at vera konfirmeraður í Føroyum. Hann kann tískil longu tá vera farin til Danmarkar at fáa sær víðari skúlagongd.

Tað, sum vit annars vita um Jacob, sæst í skiftinum hjá honum í Grønlandi. Her hevur hann so fingið starv í Rittenbank at stýra Handlinum har. Jacob varð roknaður fyri at vera dugnaligur, tí fekk hann í so ungum aldri eitt slíkt álit.

Men tað fer so at ganga niður á bakka hjá hesum unga manninum. Hann skrivar tann 21. januar 1883 m.a.:

*Jeg (skal) meddele det ærede Inspæktorat, at jeg den 23. December blev kastet paa Sygelejet med en heftig Brøstsyge eller Rheumatisme. Jeg har stadig haabet, at Sygdommen ikke vilde have noget langt Forløb, men efter i Morges at have havt det 3die Tilbagefald, som nær havde endt mit Liv, ser jeg nu, at Sygdommen desværre vil trække i Langdrag maaske Vinteren ud.*

Hann biður um at fáa hjálparfólk til handilin at kunna fáa arbeiðið frá hondini.

Tann 29.8.1883 verður sagt í eini frásøgn til stjóran hjá Jacob:

*Assistent Djurhuus har søgt om Hjemgang til nogle Aar, forsavidt at hans Helbred ikke forinden maatte være gjenoprettet. Lægen Hastrup har undersøgt ham og erklærer, at hans Sygdom nærmest bestaar af Hypokondri, der har berøvet ham Modet og Tilliden til sig selv. Lægen anser en Hjemrejse for særdeles gunstig for ham.*



*JACOB DJURHUUS*
*F. DEN 22 de APRIL1860*
*I KLAKSVIG PAA FÆRØERNE*
*D. DEN 26.de NOVEMBER 1883*
*I RITTENBENK I NORDGRØNLAND*



*Rittenbenk, har Jacob endaði sínar dagar*

**Stórar vónir settar til hann**

Tann 26. November 1883 er hann deyður. Hildið verður ikki, at hetta hevði samband við ta sjúku, hann fyrr hevur gramt seg um. Men so verður sagt, at "*hans Død kom ikke helt uventet for dem, der havde været Vidner til, hvorledes hans tidligere Arbejdslyst og Energi lidt efter lidt svandt hen. Inspektoratet maa anse hans Død for meget beklagelig, da han var blandt den yngre Kreds af Betjente, om hvem man nærede det største Haab om en god Fremtid i Handelens Tjeneste.*"

Tað skilst, at tað hevur ikki verið gott skil á tí fíggjarliga hjá Jacob móti endanum.

Ein frágreiðing til skeivu gongdina kann eisini vera ein rokning til búgvið frá Wilhelm Foghts Vinhandel í Nyhavn 1, Keypmannahavn uppá kr. 103,53. Hetta hevur verið nógv tá. Her er bestilt av nógvum sløgum og eisini av besta slag.

Skiftið vísir annars, at Jacob átti nógvar ognarlutir. Uppgerð telur einar 5 síður og eini 80 vørunummur til eitt virði av kr. 1.452 kr. Nógv varð selt á uppboðssølu, men nakað varð sent heim til foreldrini.

Jacob hevur verið lesandi maður. Hann átti 138 bøkur, og tað má hava verið nógv í 1883. Hann helt fleiri bløð, millum annað Geografisk Tidsskrift.



*Í gamla kirkjugarði í Havn liggja foreldur, tvey systkin og ein bróðursonur lið um lið*



*Sum barn búði Jacob í hesum húsinum hjá Cathrinu, einkjuni eftir pápabeiggjan. Hans Olavus. Ein dóttir teirra, Margretha Elisabeth, giftist við Oliver Petræus Effersøe, sum var í danska krígnum móti Týsklandi í 1864*

**Vinur við Jørgen Hammershaimb**

Ein lýsing av Jacob kann eisini hómast í einum brævi, sum Jørgen, sonur V.U. Hammershaimb skrivar til hansara uttan at vita, at hann er deyður tá.

Her fæst ein hóming av teirra felags áhugamálum:

**Krystalgade 11 3.sal**
**20/3 1884**

Kære ven

Hjertelig tak for dit sidste brev, som jeg modtog í slutningen af September maaned, tilligemed guldpengene. Det gjorde mig ondt at høre, at du havde været syg, og jeg gik derfor og længtes efter at faa brev med de sidste skibe – men forgæves. Jeg haaber dog ikke, at det har været sygdommens skyld, men venter at du har rejst dig igjen, saaledes at du i fremtiden kan leve til glæde og gavn for dig selv og dine medmennesker.

Jeg kan ikke andet end udtale mit inderligste ønske om at faa gode efterretninger fra dig til sommer.

Guldpengene byttede jeg og fik kr. 129,50 for dem. Deraf fik skrædderen 100 kr. Han spurgte, om du ikke længer undte ham Din søgning. Resten kr. 29,50 har jeg laant, dog saaledes, at de skulde være disponible, naar du tager en bestemmelse for dem. Af vinhandler Fogt har jeg faaet lidt over 100 kr. som godtgørelse for bladabonnement indtil nytaar 1884. Jeg har holdt de samme blade for dig. Ønsker du forandring?

"Ueber Land und Mer" synes jeg ikke, der er meget ved, det har tabt sig meget i de senere aar, hvad synes du? Et af vore egne billigere billedblade ville vist nok vise sig at være mere underholdende, især hvad teksten angaar.

"Ill Tidende" kunde jo ogsaa nok være bedre. Billedbladet Ude og Hjemme (4,75 kvartalet) leverer bedre billeder, mere kunstnerisk udført og giver et værdifuldere kunstnerisk stof, men det er ikke saa stort og behandler ikke saa meget nutidsbegivenheder. Det sidste gør imidlertid Nutiden næsten bedre end Ill. Tidende, men dets billeder er daarligere. Dagbladet er jo et godt blad, men hvis du kunde ønske et mere alsidigt blad vilde jeg anbefale dig Nationaltidende, som behandler alle mulige forhold og alle bevægelser og nyheder og fremskridt paa industriens, søfartens, handelens, agerbrugets, videnskabens o.fl. omraader. Man faar i det mere stof, men det er ikke praktisk henseende ikke saa gedigent som Dagbladet. Dagbladet er blevet lidt dyrere, idet det nu giver et søndagsnummer, men er blevet noget ivrigere i højrepoltik, end det før har været. Har du et ønske i anført retning eller i andre retninger, da skriv blot til mig. Jeg skal udføre kommissionen saa godt jeg kan.

Hjertelig hilsener til dig gamle ven fra mange hernede, som spørge til dig og mindes dig. Hjæreligtst hilses du dog af Din hengivne, trofaste ven

**J. Hammershaimb**

Alt í alt ein syrgilig lagna hjá hesum unga drongi

**Komandi partur**
Komandi partur verður um beiggjan Johannes, sum var apotekari